# The Dreams við fullari ferð

**Tað er ein dreymaferð, sum limirnir í The Dreams eru á í løtuni. Í Danmark gongur strúkandi, arbeitt verður við at koma út í heim og ein DVD fløga er væntandi. Og nú verða teir á palli í Føroyum aftur**



*The Dreams eru um nakrar dagar at síggja á føroyskum palli aftur. Tann 20. desember spæla teir í Fuglafirði, tann 22. desember spæla teir í Hoyvíkshøllini og 27. desember vitja teir á Tvøroyri.*

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

The Dreams eru um nakrar dagar at síggja á føroyskum palli aftur. Tann 20. desember spæla teir í Fuglafirði, tann 22. desember spæla teir í Hoyvíkshøllini, og 27. desember vitja teir á Tvøroyri.

Á hesum konsertunum verður tað tilfar av donsku fløgu teirra, ið verður at hoyra, umframt nakað av føroyska tilfarinum, sum flest øll kenna.

Leygardagin gongur leiðin norður til Fuglafjarðar har The Dreams fer at spæla tvær konsertir.

Tann fyrra konsertin er ein barna- og ungdómskonsert, har eisini Ragnar Finnsson við bólki fer at luttaka. Ragnar kenna vit frá songkappingini hjá DR, har Ragnar endaði millum tey fremstu av hundraðtals luttakarum.

Um kvøldið verður lagt upp til eitt ordiligt rockbrak við The Dreasms, har teir fara at taka Mentanarhúsið við stormi.

## Í topp-formi

Hans Edvard Andreasen, sangari og guitarleikari í The Dreams, sigur, at bólkurin er í topp-formi. Teir hava úr at gera og tað gongur við fullari ferð.

Og full ferð hevur verið á, síðani bólkurin fór til Danmarkar.

The Dreams hava júst verið og luttikið í sendingini Ársins Boogie-listi, sum verður send á DR1 tann 3. januar. Har eru teir á listanum og teir spæla eisini tvey løg "live" í sendingini.

## DVD við The Dreams

- Vit koma skjótt við DVD. Har er tilfar frá Summarfestivalinum, umframt gamla fløgan hjá okkum, og so 3 nýggj løg eisini, sigur Hans Edvard,

Umframt hetta, so eru t.d. eisini backstage innsløg og onnur kut við á DVD útgávuni.

## Royna seg longur úti í heimi

Tað gongur væl hjá The Dreams framvegis í Danmark.

- Nógv fólk eru sera áhugað, og vit hava fingið sera góð sambond, og nú verður arbeitt við at koma longur út í heim, sigur Hans Edvard.

- Tað var ongantíð ætlanin, at vit bert skuldu satsa uppá Danmark, sigur Hans Edvard, sum saman við hinum í The Dreams kemur heim til Føroya at undirhalda í jólafrítíðini.

Til konsertinar í Fuglafirði kunnu atgongumerkir fáast í forsølu í Kunningarstovunum í Havn, Runavík og Fuglafirði eisini kunnu atgongumerkir fáast í FK í Fuglafirði.


sansir.fo

Kunngerð um
broyting í kunngerð um útgjald
v.m. av arbeiðsloysisstuðli

**§ 1.** Í kunngerð frá 1. januar 2000 um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli sum seinast broytt við kunngerð frá 23. mars 2000 verður gjørd henda broyting:

1) Í § 1, stk. 2 sum ad. 4 verður sett:
"4. Váttan frá Fiskavirkisskipanini um, at viðkomandi ikki hevur verið í arbeiði á fiskavirki tilknýtt Fiskavirkisskipanini í minst 4 samanhangandi vikur."

**§ 2.** Henda kunngerð fær gildi frá 1. januar 2009.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina 12. desember 2008

**Alfred Petersen (sign)**
formaður

/ Ernst Jacobsen (sign)

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 17 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo